# Dimma á veg í Sosialstødd

**Tíðindi í miðlaverðini vilja verða við, at Dimmalætting í næstum fer at minka um støddina á blaðnum, men blaðstjórin vil ikki vátta hetta**

MIÐLAR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

126-ára gamla Dimmalætting hevur eftir øllum at døma eina kollveltandi ætlan fyri blaðið, sum fer at hava við sær, at blaðið minkar niður í ta stødd, sum hini føroysku bløðini koma út í – sum Sosialurin til dømis.

Tíðindini ganga í hesum døgum sum rótasúpan í føroyska miðlaheiminum, men á Dimmalætting fæst einki greitt svar, tá ið spurt verður um tíðindini.

– Vit arbeiða alla tíðina við at betra um blaðið, men meira kann eg ikki siga í løtuni, sigur Ingi Samuelsen, sum hevur verið ábyrgdarblaðstjóri á Dimmalætting síðani 1. januar í 2002.

Fyri einum góðum ári síðani, tá ið Dimmalætting hátíðarhelt sín 125 ára dag, váttaði Ingi Samuelsen í Sosialinum, at leiðslan hevði umhugsað at broyta støddina á blaðnum í sambandi við føðingardagin, men at tað ikki ikki gjørdist veruleiki.

### Byrjaði í minni stødd

P/F Dimmalætting er elsta partafelagið í landinum, og felagið hevur síðani 1878 givið blaðið Dimmalætting út.

Blaðið er kent fyri at koma út í sonevndu broadsheet-støddini, men í grundini kom blaðið fyrstu árini út tabloid-stødd – tað er støddin, sum til dømis Sosialurin kemur út í.

Fyrstu árini var útgávan av Dimmalætting fýra tabloid-síður, men í 1921 fekk blaðið broadsheet-støddina, sum tað síðani hevur verið kent fyri.

Men líkt er nú til, at Dimmalætting av álvara umhugsar at fara aftur til tabloid-støddina, sum blaðið kom út í fram til 1921.

Í útlandinum eru fleiri bløð seinnu árini farin úr broadsheet-stødd og niður í tabloid-stødd. Til dømis eru nógv dømi um hetta í Svøríki, og har halda leiðslurnar, at umleggingarnar hava eydnast væl.





*Gongdin í útheiminum er, at alsamt fleiri bløð ganga frá Dimmustødd til Sosial-stødd. Frá 1878 til 1921 varð Dimmalætting prentað í Sosialstødd, og eftir øllum at døma vendir gamla blaðið aftur til hesa støddini í næstum*

## Kendur danskur fjølmiðlamaður til Føroyar

**Annan leygardag fer kendi danski fjølmiðlamaðurin og fyrilestrarhaldarin, Georg Metz, at halda fyrilestur í Klaksvík, í sambandi við, at Klaksvíkar Kommuna hevur sett sær fyri at skapa eitt breitt orðaskifti um skúlan**



FYRILESTUR

Georg Metz starvaðist á Danmarks Radio 1969-88, hagani hann er kendur sum ein dugnaligur sjónvarpsvertur, frá TV-Avisen, Radioavisen, og mentanarsendingum.

Í dag er Georg Metz virkin sum rithøvundur, blaðstjóri og ein av hollastu fyrilestrarhaldarum í Danmark.

Klaksvíkar Býráð hevur sett sær fyri at fáa í lag eitt aðalorðaskifti um skúlan. Aðalorðaskiftið skal vera breitt og rúmligt, har aðalmál skúlans við undirvísing í breiðari merking verður tikið upp – og serliga at taka til viðgerðar teir karmar, sum neyðugir eru fyri at kunna hýsa eini tíðarhóskandi undirvísing.

Støðið verður, at tikið í verandi tveimum skúlum, har orðaskiftið skal kunna greiða, hvussu sær framtíðar skúlin í Klaksvík út um 5 - 10 og 15 ár?

Fyrilesturin hjá Georg Metz, sum verður 19. mars er ein yvirskipaður almennur fyrilestur, sum breitt letur upp fyri hvønn týdning ein kveikjandi skúli kann hava fyri lívsgongdina hjá næminginum.

– Ein góð kveikjan fyri framhaldandi fundarvirksemi, sum verður um skúlan í Klaksvík, og hvussu hann kemur at síggja út í frátíðini, sigur Mentanardeildin hjá Klaksvíkar býráð.

Á ferð síni í Føroyum fer Georg Metz eisini at halda almennan fyrilestur í Norðurlandahúsinum og fyri starvsfólkunum í Útvarpi Føroya um dagsins viðurskifti í fjølmiðlaheiminum.

Tað er Mentanardeilidin hjá Klaksvíkar kommunu, sum hevur fingið vitjanina hjá Georg Metz í lag. Georg Metz er kendur frá DR, TV-Avisen, Informatión, kjaksendingum og hevur skrivað hópin av bókum

– Hann er í løtuni ein av mest virdu fyrilestrarhaldarum í Danmark.


# MÓTTØKA



Í samband við at vit eru flutt í nýggja høvuðsbygning okkara, og at tað 1. apríl verða 25 ár síðan mjólkarvirkið byrjaði framleiðslu, verður almenn móttøka í bygninginum
**fríggjadagin 11. mars frá kl. 15 – 18.**

Vit gleða okkum at vísa tykkum okkara nýggja bygning.

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.



## KT-STARV Á HAGSTOVUNI

VIT SÓKNAST EFTIR EINUM VÆL ÚTBÚNUM STARVSFÓLKI TIL KT DEILDINA.

Á Hagstovuni verða flestu hagtalsuppgávur loystar í samstarvi millum hagfrøðingar og KT starvsfólk, og tað er til slíkar verkætlanir, at vit sóknast eftir eftir einum fólki.

KT skipanirnar á Hagstovuni eru grundaðar í einum Oracle umhvørvi við bæði UNIX og WINDOWS teldum. Í arbeiðinum á KT deildini verða brúkt Oracle menningar- og forritannaramboð, sum SQL, PL/SQL, Warehouse Builder etc. Somuleiðis brúka vit Oracle IAS/PORTAL í samband við heimasíðuna hjá stovninum.

Kunnleiki til eitt ella fleiri av hesum amboðum er ein fyrimunur, men ikki ein treyt. Fyrst og fremst sóknast vit eftir einum dugnaligum fólki, við innliti í datamodell, databasuskipanir og programmering.

Trý fólk eru í KT-deildini, og eru tey uppi í øllum verkætlanum á stovninum. KT arbeiðið á stovninum er eyðkent av, at nýggjar skipanir alsamt verða mentar, samstundis sum verandi skipanir verða víðari mentar. Sostatt er arbeiðið ógvuliga fjølbroytt og møguleiki er at royna seg á nógvum KT økjum.

Starvið verður lønt í samsvari við førleikar og starvsinnihald, sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. apríl 2005.

Set teg í samband við Berg Dam ella Hermann Oskarsson á Hagstovu Føroya, telefon 35 28 00 vilt tú hava meira at vita um starvið.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO